» Forsíða

# 30-12-2007 | Nýggjársrøða 2007



Gott kvøld øll somul.

Vit hava eitt av heimsins tryggastu samfeløgum.

Vit liva í tí friðarliga partinum av heiminum, men tað er ikki nóg mikið í sjálvum sær. Eitt rótfest fólkaræði, samhaldsfesti, ein sterkur samleiki og góð ættar- og vinarbond skapa samanhang millum ættarliðini og samanhang í samfelagnum. Úrslitið er eitt trygt stað hjá børnum at vaksa upp, har kriminaliteturin er lítil, fólkið álitisvekjandi og mentanin ein berandi megi. Hetta er grundarlagið undir tí góða samfelagnum.

Tað, sum hjá okkum er grundarlagið, er fyri onnur eitt mál. Kostnaðin av at røkka hesum máli, hoyrdu vit m.a. um í farnu viku, tá andstøðuleiðarin í Pakistan, Benazir Bhutto varð myrd.

Vælferðarsamfelagið, vit hava í dag, er úrslit av einum miðvísum arbeiði. Okkara vælferð er í støðugari menning, og halda vit kós, eru vit á veg til at fáa eitt vælferðarsamfelag, ið telist millum heimsins bestu, og sum er høvuðsmálið í Visjón 2015

Sjálvsvirðing og sjálvsálit eru alneyðug, skulu vit náa málinum. Men júst hetta prógva vit ferð eftir ferð, tá vit hava víst í verki, at vit trúgva á okkara evni og tora at taka við avbjóðingum.

Føroyskar fyritøkur hava víst, at tær klára seg á útlendskum marknaðum. Ungdómurin ger seg galdandi í heimselituni í fornum ítróttargreinum sum svimjing og rógving, og íborna sanggleðin hjá føroyingum vellir fram millum sangarar og tónleikabólkar, sum skara framúr í millumtjóða kappingum.

Gløgga eyga gestsins hevur lagt okkara dýrabaru virði til merkis. Heimskenda tíðarritið National Geographic hevur kosið Føroyar mest serstaka ferðamál millum heimsins oyggjar.
Nýggjar tíðir skapa nýggjar tørvir.

Vit kunnu staðfesta, at Føroyar eru vorðnar eitt opnari og tolsamari samfelag. Kjakið um javnstøðu millum kynini er mennandi, og tey nógvu átøkini, sum hava verið frammi í seinastuni, stimbra undir javnstøðu, ikki bara í politikki, men eisini í leiðslum og nevndum hjá tí almenna og tí privata. Eg frøist um, at útlit eru fyri, at fleiri kvinnur koma á ting.

Javnrættindi eiga at verða tillutað øllum uttan mun til húðalit, lívsáskoðan ella kynsligan samleika.
Tolsemi og fjølbroytni eru grundvøllurin undir nýskapan, og nýskapan er ein av fremstu fyritreytum fyri framburði.

Vit eru ávegis at fáa eitt samfelag, sum kann draga til sín kapital og skapandi arbeiðsmegi. Vit eru ávegis at skapa teir røttu karmarnar fyri tí góða samfelagnum. Vit eru ávegis at røkka okkara Visjón 2015.

***

Føroyar standa á einum vegamóti. Vit hava tikið týdningarmikil stig fyri at gerast samrunnin partur av altjóða búskapinum. Nú ræður um at halda kósina.

Fjølbroytnið í vinnulívinum hevur økt um búskaparvøksturin. Bruttotjóðarúrtøkan, ið er meira enn tvífaldað síðani kreppuárini, er vaksin 25 prosent seinastu fýra árini. Partar av landsins vinnuligu ognum eru einskildar, og virði eru leysgivin. Vitanar- og tænastuvinnurnar eru í stórum vøkstri, og alt fleiri føroyskar fyritøkur eru nú virknar víða um heim.

Vit nærkast málinum at menna ein fjøltáttaðan og váðaspjaddan búskap, ið betri kann standa seg móti afturgongd og sveiggjum í fiskaprísum á altjóða marknaðum. Alivinnan er komin væl fyri seg aftur og økir munandi um okkara útflutningsvirði.

Ferð er á búskapinum, og tað skapar framburð. Tað setur krøv til politikarar at finna røttu javnvágina og taka skilagóðar avgerðir, soleiðis at búskapurin ikki gerst ov heitur.

Hjá flestu familjum kennist tað tíverri ofta torført at náa allar uppgávur, og strongd kann skjótt gerast ein fólkasjúka. Ein av avbjóðingunum hjá samfelagum er tí at geva fólki møguleika at skapa javnvág millum familjulív og arbeiðslív.

Hetta valskeiðið hevur verið merkt av friði á arbeiðsmarknaðinum, og fyri fyrst ferð eru sáttmálar gjørdir fyri longri tíðarskeið. Tí harmist eg um ósemjuna millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið, sum er endað í verkfalli, og sum nú leggur høvuðsvinnuna lamna.

Føroyingar gera íløgur sum ongantíð áður. Tey virði, sum vit áður høvdu standandi í fíggjarstovnum, verða nú í størri mun nýtt til íløgur. Íløgumentanin kann skapa nýggjar inntøkukeldur og fjøltáttar okkara fíggjarliga grundarstøði.

Í hesum ráki eru tað mong, sum tillaga seg og gagnnýta øktu vælferðina, meðan onnur ikki vera við í hesum nýggja ráki. Tess meira er tað ábyrgdin hjá samfelagnum at taka sær av teimum, sum ikki fáa lut í ágóðanum. Vit mugu forða fyri, at eitt nýtt stættarbýti tekur seg upp.

Vit hava raðfest íløgur fyri at nútímansgera heilsuverkið og eldraøkið. Møguleikarnir fyri barnaansing eru betraðir munandi, og kommunurnar hava framt eitt megnar arbeiði, so at tørvurin á barnaansing er um at vera nøktaður.

Vit hava í hesum samgonguskeiði megnað at skapt nógv og stór vælferðarpolitisk framstig, sum sjáldan áður. Nógv hava vit nátt, og tað, vit ikki hava nátt, muga vit taka uppaftur, tí onki verk eigur at fara til spillis.
Samfelagið skal ikki vera fyri tey útvaldu, men fyri øll.

***

Føroyar eru við at gerast eitt vitanarsamfelag, har týdningarmesta tilfeingið er eitt útbúgvið fólk. Fortreytin er tí ein góður fólkaskúli.

Vit mugu gera íløgur í skúlar, undirvísingartilfar og í at førleikamenna lærarar. Vit mugu hava ein fólkaskúla, sum veruliga tekur støði í tí einstaka næminginum, tí børn eru ymisk og hava ymiskar førleikar, evnir og áhuga. Vit mugu miða eftir fjølbroytni í fólkaskúlanum, tí øll skulu hava møguleika at læra, mennast og gagnnýta síni evnir. Tá hava vit ein fólkaskúla, sum veruliga er fyri øll.

Ein almennur málpolitikkur eigur at verða settur í verk. Málið er týðandi partur av okkara samleika og fyritreytin fyri at læra fremmandamál – ein kunnleiki, sum er alneyðugur, skal ein fóta sær í altjóða samfelagnum.
Vit standa framman fyri stórum avbjóðingum viðvíkjandi gransking, tí vit eru ávegis at gerast partur av granskingarskipanini hjá ES. Slíkt altjóða samstarv opnar dyr og gevur góðar møguleikar at mennast.

***

Uttanríkispolitiskt hevur farna árið verið hendingaríkt á fleiri økjum. Sjáldan áður hevur tað verið so sjónligt, at søga, uppruni og politisk siðvenja eru avgerandi fyri, hvussu heimspartar, lond ella landspartar loysa avbjóðingar og trupulleikar.

Lond og heimspartar, sum hava sína rót í vesturlendskari mentan og fólkaræði, velja fríar politiskar tilgongdir, samrøðuna og demokratisk val.

Tíverri eru bæði heimspartar og lond, har siðvenjan hvørki er fólkaræði ella opinleiki. Á afrikanska meginlandinum stríðast fleiri lond við politiskar leiðslur, hvørs ódugnaskapur hevur leitt londini í óføri.

Í fjareystri stríðast lond sum Teiland, Myanmar og Pakistan við hernaðarstjórnir. Tað var tí skelkandi at frætta, at trilvandi royndin hjá Pakistan at finna vegin til fólkaræði fekk eitt skot fyri bógvin, tá ið andstøðuleiðarin Benazir Bhutto varð myrd. Vónandi steðgar dirvisleysa drápið ikki gongdini til fólkaræði.

Glottar eru tó eisini í heimspolitikkinum, og friðarsamráðingarnar millum ísraelar, palestinar og semingspartar geva varna vón um, at glið kann koma á friðargongdina í Miðeystri.

Heimsamfelagið má standa saman um at veita hjálp, har armóð og neyð ræður. Her eigur okkara lutur ikki at liggja eftir. Mítt mál hevur verið at fáa ein væl grundaðan menningarpolitikk, soleiðis at vit eru við í menningarsamstarvi á munadyggum grundarlagi. Tað ger mun, tí aftan fyri hvørja krónu er ein mannalagna.
Føroyingar eru fúsir at veita eina hjálpandi hond til illa stødd, og nógv verður latið til hjálparfelagsskapir víða um heim. Hesin hugburður í fólki okkara er gull verdur.

Tað er tó ikki einans fátækradømi og sjúka, ið hóttir heimin. Veðurlagsbroytingar hótta heimssamfelagið, og ein tann største avbjóðingin er at fáa ídnaðarlondini at minka um $CO_2$-útlátið. Ov lítið ítøkiligt kom burturúr veðurlagsráðstevnuni á Bali herfyri, og tí liggur stórt arbeiði fyri framman, skulu munagóð úrslit fáast á altjóða veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í 2009.

Eg harmist um, at vit ikki enn hava víst í verki, at Føroyar taka trupulleikarnir við veðurlagsbroytingum í nóg stórum álvara. Vit mega vera virkin í samband við ráðstevnuna í Keypmannahavn, soleiðis at vit frá byrjan kunnu taka neyðugu tøkini og binda okkum til altjóða ásetingar.

Menningin av landi okkara er tengd at luttøku í altjóða samstørvum. Nýbrot eru hend á uttanríkisøkinum, og vit eru vorðin meira virkin í heimssamfelagnum. Sendistova er latin upp í Reykjavík, nýggj og betri høli eru fingin til vega í Brússel, og Føroyar hava fingið atlimaskap í matvøru- og fiskivinnufelagsskapinum hjá ST, FAO. Møguleikar eru nú skaptir fyri, at Føroyar verða partur í ES granskingarsamstarvinum. Alt mál, ið Visjón 2015 fevnir um.

Vælferðarsamfelagið eigur ikki einans at byggja á tímiliga vælferð. Andalig vælferð og trúarlív eru grundarsteinar undir samleika okkara, sum skapar samábyrgd og samkenslu við medborgarar nær og fjar. Tað er soleiðis, vit byggja land og bera dýrabara arvin víðari. Tað var ein stórhending, tá vit ólavsøkumorgun í ár fyri fyrstu ferð fóru til gudstænastu í einari føroyskari kirkju, somuleiðis tá ið fyrstu bispur í føroysku kirkjuni varð tilnevndur. Yvirtøka av okkara aldargamla mentanarbera tænir politisku skipanini til miklan sóma.

Nøkur okkara, sum vóru við til at byggja hetta land, eru ikki ímillum okkum longur. Harrin styrki tykkum, sum mistu, og gevi øllum áræði at halda fram í nýggja árinum.

Latum okkum sum tjóð standa saman, og hvør gera sítt til, at Føroyar gerast eitt av heimsins fremstu londum. Vit hava flutt landið longur fram á leið seinastu árini. Vit hava grundstøði í tí trygga samfelagnum og framíhjárættin at skapa tað góða samfelagið fyri øll – tað samfelag, okkara børn skulu arva.

Guð signi Føroyar, okkara land.

Gott nýggjár!